# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fær tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- Fylgjarauppgávur
- Stimbran
- Familjuráðgeving
- Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Eysturoy**
**1)** Søkt verður eftir 3 umlættingarpersónum, at arbeiða kvøld- ella náttarvakt í dagtilhaldinum i Rók í Saltnesi.
**Leyst at søkja eru:**
2 størv har arbeitt verður frá kl. 16.00 til 23.00, eitt kvøld um vikuna og
1 starv har arbeitt verður frá kl. 22.00 til 09.00, eitt kvøld um vikuna.

Fyrimunur er um umsøkjararnir hava royndir at arbeiða við børnum, sum bera brek. Fyri at frætta nærri um størvini, ber til at ringja til Marjun Nielsen, leiðara á Rók á tlf. 447003.

**Tórshavn**
**2)** at stuðla einum 3 ára gomlum fjølbrekaðum drongi á allan hátt, við venjingum og spæli og fara við honum til viðgerð. Tímatalið er 15 tímar um vikuna seinnapart, tó fríggjadag fyrrapart el. seinnapart. Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur koyrikort.

**3)** At stuðla einum 11 ára gomlum fjølbrekaðum drongi eftir skúlatíð og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk. Arbeiðið fer fram í Brigdehúsinum, ið er eitt tilhaldsstað fyri stuðulsfólk. Tímatalið er 25 tímar um vikuna og er arbeiðstíðin frá kl. 13.30 mánadaghósdag og fríggjadag frá kl. 11.30. Neyðugt er, at tann ið settur verður, hevur koyrikort.

**4)** Søkt verður eftir umlættingarfamilju til 5 ára gamlan drong eina nátt um vikuna. Arbeiðið fevnir um, at heinta drongin í barnagarðinum, hava hann um náttina og avleverað hann dagin eftir í barnagarðinum.

**5)** at stuðla og menna einari 8 ára gamlari gentu við spæli og venjingum og fara við henni til ymisk tiltøk. Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni. Tímatalið er 27,5 tímar um vikuna.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Karin á Heygum á tlf. 353510, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postsmoga 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. feb. 2003.

**Í umsókníni skal vera tilskila uppgávunummar.**


Nardus samkoman, Tórshavn.

Evangeliskir fundir verða við evangelisti

***Torkild Terkelsen***

í Losjuni við Tinghúsvegin í Havn hesar dagar:



**Leygarkvøldið**
**1. feb. kl. 20.00**

**Sunnukvøldið**
**2. feb. kl. 18.00**

***Øll eru vælkomin!***

Nardus samkoman

Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg



# ÚTSØLA

Útsølan byrjar leygardagin 8. feb.
við hópin av góðum tilboðum.

Allar meturvørur -50% *(tó ikki lagurvøra)*

Eisini hava vit hesi tilboð av PFAFF og HUSQVARNA seymimaskinum:



PFAFF Tiptronic 2020
Fyrr 8.995,-
Nú einans 7.995,-

PFAFF Tiptronic 2030
Fyrr 10.595,-
Nú einans 9.595,-

HUSQVARNA Iris Broderi/seymimaskina
Fyrr 13.995,-
Nú einans 9.995,-

HUSQVARNA Daisy 325
Fyrr 4.995,-
Nú einans 4.295,-

*Avmarkað nøgd*

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05


# Pedagogur

## til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2003 (ella eftir nærri avtalu).

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs, leiðara tlf. 225222/444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. oktober kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 06. februar 2003

**Fuglafjarðar býráð**


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

TK Stovan

**Ring!**
**Vit koma**

**TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.**

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

**31 73 66**
**www.tk.fo**

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
**Fax** 319363
**www**.tk.fot
**E-mail** tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR




# Postboð á Oyrarbakka

Starv sum postboð á posthúsinum á Oyrarbakka er leyst at søkja.

Roknað verður við at viðkomandi, sum fær starvið, fyri tað mesta skal avgreiða postin til bygdirnar Funningsfjørð, Elduvík, Funning og Gjógv, men at avloysingar á øðrum umdømum og annað arbeiði kann verða álagt.

Arbeiðstíðin er tilsamans 7 tímar um dagin.

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Skrivlig umsókn skal vera postverkinum í hendi í seinasta lagi 21. februar 2003.

Postverk Føroya
Postboks 3009 · 110 Tórshavn

# Fyrstahjálp

**Víðka skeið 20 tímar (fortreyt: lokið grundskeið ikki eldri enn 1. august 2001):**
Byrjar 1. febr. 2003 (1. og 2. + 8. og 9. mars)

**Sálarlig 1. hjálp:**
Byrjar 15. febr. kl. 14-16 verður annars:
20. febr.: kl. 19-21,
22. febr.: kl. 14-16 og
27. febr.: kl. 19-21.

Um ov lítil tilmelding er, verða skeiðini ikki hildin.

Tilmelding á tlf. 319630, Fax. 311217
Teldupost: redcross@redcross.fo.

**Reyði Krossur Føroya**

# Sethús í Havn til sølu

**Javnagøtu 10**



Húsini eru í 2 hæddum, hvør 120 fermetrar og standa í barnavinarligum, friðarligum umhvørvi við góðum útsýni.
Báðar hæddir eru innrættaðar, við íbúð í niðaru hædd. Grundøkið er uml. 500 fermetrar.
Uttanum húsini er stoyptur garður við trægirðing.
Byggiár: 1983.
Kostnaður: kr. 1.875.000

Áhugað kunnu ringja

**tlf. 322424 ella 254637**


sera bíligt at
**leiga sjónvarp**

úr 240,- og niðureftir (einki depositum)

Allar støddir 20-26"

Vit hava eisini video

RADIO VERKSTAÐIÐ
v/Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1 - Tórshavn
Tlf. 319544



# YAMAHA

**AW16G Digital Audio Workstation**



Ein sera væl útgjørdur 16 spor Harddisk recordari, lættur at taka við sær, lættur at nýta og ikki minst, ein sera lættur prísur. AW16G hevur nógvar av somu møguleikum sum flaggskipið AW4416 hevur, m.a. 2 effektmaskinur í topp góðsku. AW16G hevur innbygdan fløgubrennara, so tú hevur eina fullkomna loysn heilt frá byrjan til fløguna.

AW16G hevur møguleikar sum eru óhoyrdir í sínum prísklassa, so sum møguleikan at taka 8 spor upp samstundis, innbygdan Loop-samplara, 4 band Eq og dynamik til øll sporini, 36 spor mix og Sound Clip.

Alt í alt, ein sera góð loysn til eitt hvørt tónlistarligt endamál

Vanligur prísur í DK 13.200,-
*tilboð einans* **11.490,-**

Kom inn í Elding og síggj hvussu tú kanst vinna eitt gávukort á kr. 1.000,-

*Ein betri loysn!*
ELDING
SMS – Tel. 319697 • Saltangará – Tel. 449697 • Klaksvík – Tel. 479697


# Jørð á Selatrað til sølu

Við hesum verða 12 gyllin og 3 skinn í »Garðshaga Uttari« lýst til sølu.

Eisini verða tilsamans 5.678 $m^2$ av innangarðsjørð á Selatrað lýst til sølu.

Innangarðsjørðin umfatar matr. 10, Selatrað, sum er »Ytra Fornamørk«, sum er 5.281 $m^2$ til víddar og partar av matr. nr. 107, Selatrað, »Úti á Oyri«, sum er 392 $m^2$ til víddar.

Jørðin verður seld um hóskandi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Skeið í AUTOCAD

| | |
|---|---|
| **Undirvíst verður í:** | Auto-Cad 2000 - gundskeið Skeiðið er fyri fólk, sum lítlar ella ongar royndir hava at arbeiða við Auto-Cad. |
| **Tíð:** | **10., 11., 13. og 17., 18., 20. mars 2003 kl. 18.00-21.10.** |
| **Skeiðleiðari:** | Suni Dalsgaard, arkitektur |
| **Kostnaður:** | kr. 3.500,00 íroknað frálæru, tilfar og mat |
| **Stað:** | Tekniski Skúli |
| **Tilmelding:** | **Innan 26. februar 2003** |

**Skeiðsdepilin við Marknagil * SDM**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo


*Hugna tær á Hotel Vágum!*

***ÓGLOYMANDI LEYGARKVØLD***

*Leygarkvøldið 8. febr.*

***Vit bjóða:***
***Frítt val** úr okkara **a la Carte menu***
***2 rættir bara 195,-***
***3 rættir bara 225,-***

***Dømi:***
- *Rómatilgjørd skeljadjórasuppa*
- *Djóramedaljongir*
- *Lakaðar melónkúlur*

*~~Prísur 315,-~~* ***225,-***

*við í prísinum er atgongumerki til dansin við **EXPRESS !!***

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL



*Frá kl. 23.00 spælir*
***EXPRESS***
*(Black Panters)*
*til dans*
***100,-***

***Minst til at bíleggja borð í góðari tíð á tel 33 29 55 - avmarkað atgongd!***

*Gisting úr **250,-***
*fyri hvønn*

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA • SØRVÁGUR • TEL 33 29 55 • FAX 33 23 10 • T-Postur: hotel@ff.fo